# Millum best og næstbest

NIELS ARGE GALÁN
200



**»Samband als ikki er tað ringasta fyri okkara land. Heldur ikki tað besta. Tað er tað næstbesta«, segði Niels Arge Galán, sangari og gittarspælari í 200 m.a. í røðu fyri Magna Laksáfoss og Hergeiri Staksberg**

Hjartaliga vælkomin til hesa hugnaløtu, har vit um eina løtu fara at handa tveimum monnum riddarakrossin hjá 200. Vit fegnast um, at báðir, sum fingu riddarakrossin í boði játtaðu at taka ímóti honum.

Í grundgevingini fyri hvør fær riddarakrossin handaðan varð í tíðindaskrivi sagt at tað eru fólk, sum bróta okkara fordómar og ikki lata seg seta í bás.

Vit hava øll fordómar. Fordómar um loysingarfólk, sambandsmenn, baptistar, klaksvíkingar …; fordómum hava vit nóg mikið av.

Fordómar eru allíkavæl hentir. Teir hjálpa okkum, so vit fáa sett tingini í system. Men fordómarnir eru ein trupulleiki tá man heldur, at har veruliga er eitt system.

Og tað er eisini í lagi at hava fordómar – bara man er opin um at tað júst eru fordómar. Vit skulu bara minnast til ikki at taka teir ov nógv í álvara.

Men av og á hendir tað gleðiliga, at tað gongur sjón fyri søgn, at fordómar bert eru fordómar. At knappliga kemur ein, sum als ikki passar inn í myndina. Sum brýtur alla vanahugsan og noyðir okkum at endurhugsa alt, sum vit hildu var galdandi.

**Magni Laksáfoss**

Magni Laksáfoss kom sum eitt snarljós inn á politiska leikpallin og oyðilegði alt, sum vit hildu vera galdandi fyri sambandsfólk. Okkara vanligu fordómar um, at sambandsfólk vóru grenjut, afturhaldssinnað, gomul, autoritetstrúgv, manglaðu humoristiskan sans, ikki skiltu ironi og ikki dugdu at argumentera fyri sínum sjónarmiðum vóru so dyggiliga gjørdir til skammar.

Magni Laksáfoss hevur við sínum evnum at grundgeva fyri sínum hugsanum á ein siðiligan, objektivan, onkuntíð stuttligan og ofta – og ikki minst – fakligan hátt vunnið okkara virðing. Magni boðar frá einum nýggjum ráki í sambandsflokkinum, sum vit heilsa vælkomnum.

Til ungar sambandsveljarar skal okkara áheitan vera, at um tú absolutt skalt velja ein sambandsmann, so skalt tú velja Magna Laksáfoss. Sum tað stendur skrivað í sanginum "Nýtt blóð":

· Tú skalt velja ein politikara, sum hevur integritetin
· Tú skalt velja ein politikara, sum er komin yvir pubertetin
· Tú skalt velja ein við visjónum
· Tú skalt velja ein við passión
· Tú skalt velja ein við hjartanum
· Tú skalt velja nýtt blóð

Magni Laksáfoss er ein kulur sambandsmaður, og tí vilja vit handa honum riddarakrossin.

**Hergeir Staksberg**

Maðurin, sum hevur verið á flestum 200-konsertum, bert yvirgingin av 200 sjálvum er Hergeir Staksberg. Hergeir hevur verið í vinaskaranum í mong ár. Hann spældi bassgittar í Makrel, sum oftani spældi saman við 200. Ein valdag fyri nøkrum árum síðani kom prátið sjálvandi inn á valið: Hvønn man skuldi velja, fert tú at velja rætt og so framvegis. Tá segði Hergeir, at hann fór at velja sambandsflokkin eins og hann altíð hevur gjørt. "Ert tú sambandsmaður?? Tú ert einki sambandsligur!" var svarið.

Eftir at Hergeir í fleir ár hevði reypað um hvussu nógvar 200-konsertir hann hevði verið til gekk man líkasum út frá, at maðurin var samdur við 200. Men tað er hann tvørturímóti.

Hergeir hevur seinastu árini gjørt vart við seg sum viðmerkjara í bløðunum, har hann hevur sera spískar og beinraknar greinar um samfelagið sum heild. Við einum sunnum humoristikum sansi og frá teimum skeivu vinklunum málar hann keipumyndir av samfelagnum og vísir á hvat kann gerast øðrvísi. Um 200 brúktu lesarabrøv sum miðil, vildi okkara fyrimynd verið Hergeir Staksberg.

Hergeir er ein kulur sambandsmaður, og tí vilja vit handa honum riddarakrossin.

**Samband er silvur**

Eg veit, at samband tað er silvur
Og silvur merkir nummar tvey
Eg veit, at samband tað er silvur
Og silvur tað er eftir reyv

Men júst við hesum eru nýggir tónar frá 200. Tí við hesum viðurkenna vit, at samband als ikki er tað ringasta fyri okkara land. Men tað er heldur ikki tað besta. Tað er tað næstbesta.

Vit doyggja jú ikki í hungri, verða ikki pínd ella fongslað fyri okkara politisku áskoðanir. Alt í alt liva vit í einum sera hyggeligum landi. Tað er fínasta slag. Tað er ikki best, men tað er næstbest.

Men hví skal gjógvin vera so djúp millum okkum, sum vilja tað besta og tey, sum vilja tað næstbesta? Átti tað ikki at verið meira samstarv millum hesar vanliga so ósamdu partar? Tí júst at vilja nakað við hesum landinum er tað, sum eyðkennir sambands- og loysingarveingirnar í føroyskum politikki. Hesir skjótt fyrrverandi mótpólarnir eru teir, sum veruliga brenna fyri hesum landi. Og tað er meira enn vit kunnu siga um hinar politisku hugsjónirnar.

Við at heiðra tveimum sambandsmonnum her í dag vilja vit byggja brúgv millum okkum, sum vilja ávíkavist tað besta og tað næstbesta fyri okkara land.

Við hesum orðum fara vit at handa Magna Laksáfoss og Hergeiri Staksberg riddarakrossin.

Takk fyri.

# Tað er ein spurningur um raðfesting

ASBJØRN DJURHUUS



**Viðmerking til greinina hjá Heðini Mortensen, "fleiri pengar enn uppgávur"**

Heðin Mortensen Borgarstjóri heldur lítið um at vit í Sundalagnum, og aðrar kommunur úti um landið, hava gjørt íløgur í eldraøkið.

Hann heldur at vit, og aðrar kommunur við okkum, svimja í peningi, og ikki reiðiliga vita hvat peningurin skal brúkast til. Tí eru kommunurnar nú farnar ígongd vit at loysa uppgávur hjá landinum, til dømis eldraøkið.

Veruleikin er ein annar. Kommunurnar úti um landið hava bara raðfest annarleiðis enn Tórshavnar kommuna. Eg ivist onga løtu í at flestu kommunur kundu hugsa sær eitt skattaprosent uppá 19,75 %, ella møguleika fyri at sett 3 borgarstjórar, men tær flestu hava heldur raðfest eldraøkið, og av tí saman hava onnur øki máa bíða.

Sannleikin er at høvdu kommunurnar ikki tikið um endan á røktar- og sambýlisøkinum, so høvdu nógv eldri fólk ligið hjálparleys runt um í landinum. At Tórshavnar kommuna nú loksins eisini ætlar at raðfest økið, kunna vit onnur bert fegnast um.

Hvaðani stavar alt ríkidømi. Jú her hjá okkum í sundalagnum, stavar tað sambært Heðini, frá teimum sum dagliga koyra til Havnar at vinna sær fyri dagligt breyð. Men veruleikin er ein annar. Hagtøl frá Landssverk siga at flestu samanstoytir henda á vegastrekkinum ímillum Eysturoynna og Suðurstreym. Hetta sigur mær so mikið at ferðslan ikki er einvegis. So her kann byttan verða sum lokið

Heðin spyr meg um bíðilistan til bátapláss í Sunda Kommunu. Í Havnini er bíðilistin eftir bátaplásssi eftir øllum at døma longri enn bíðilistin eftir røktarheimsplássum. Vit hava ongar bíðilistar. Heðin tosar um 27 føts bátar sum kosta 5000 krónur í havnagjaldið í Tórshavn..Men her haldi eg Heðin fer eitt sindur skeivur, smábátar gjalda eftir breidd. Men liggja teir uppá longs í Havnini so kundi bíðilistin kanska verði styttir nakað, bara við at lagt bátarnar annarleiðis. Samsvarandi upphæddin hjá okkum er 2000 krónur

Annars gleðist eg um at Heðin nú tykist vilja finna nakrar milliónir til røktarheimsbygging í Tórshavn, og samstundis tekur undir við einari kommunalari útjavning, uttan tó at samantvinna hesi mál.

Heðin, eg haldið vit kunnu gera so nógv annað enn at kjakast í bløðunum um bilar og bátar. Vit hava jú báðir møguleika fyri at ávirka á røttum stað, soleiðis at vit kunna gera tað so liviligt hjá øllum borgarum og kommunum í landinum.

Lat okkum taka løgvatak saman og finna skilagóðar loysnir.

Tá grør um gangandi føt.

DEKKMASTER.FO

...tá ið prísurin eisini er avgerandi!

fastir, lágir prísir á dekkum og felgum






Flottir heildekkandi hjálmar við allergivinarligari bjálving og løttum lási til høkureim. Klárt glas, ið ikki skøvast. Góðkendir til motorsúkklu og tí eisini væl egnaðir til knallert og skutara. Fáast í fleiri litum og støddum.

Summardekk

Prísdømi

| | |
|---|---|
| 175/65-14 | úr **620,-** |
| 195/55-15 | úr **775,-** |
| 195/65-15 | úr **795,-** |
| 205/55-16 | úr **890,-** |
| 205/40-17 | úr **965,-** |
| 225/45-17 | úr **995,-** |
| 225/40-18 | úr **1.290,-** |
| 235/35-19 | úr **1.710,-** |




**Nýtt felgukatalog við øllum teimum flottu felgunum frá Dekkmaster kann nú takast niður á www.dekkmaster.fo**